# Auto Service skal

**Fyri viðskiftafólk, sum vitja fyritøku okkara, skal tað kennast sum ein verulig uppliving, bæði tað tey síggja, og tænastan tey fáa, sigur Árni Rasmussen, stjóri í P/F Auto Service**



**BILASØLA**

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Tað er sum at koma inn í ein fíggjarstovn at koma inn í móttøkuhølið hjá Auto Service við Oyggjarvegin í Havn. Samstundis sum starvsfólkini sita við teldurnar og avgreiða kundar, eru tey til reiðar at veita teimum, sum koma inn á poleraðu gólvini eina góða tænastu.

Síðan vit byrjaðu okkara virksemið við P/F Auto Service í november 2005, hava vit arbeitt miðvíst við at umbyggja og nútímansgera fyritøkuna soleiðis at vit á øllum økjum kunnu liva upp til tað, sum starvsfólk og kundar okkara eiga at vænta av eini nútímans fyritøku, sigur Árni Rasmussen, stjóri hjá Auto Service.

Fólkini í kundamóttøkuni arbeiða saman sum eitt team. Umframt kundamóttakara eru eisini fólk frá eykalutagoymsluni, verkførarar og tekniski leiðarin har. Tey eru til reiðar at hjálpa kundanum við einum hvørjum fyrispurningi - um bilurin skal á verkstað, keyp av eykalutum ella annað í hesum sambandi. Øll sum sita har hava ábyrgd av, at kundin verður avgreiddur.

Filosofiin aftanfyri hetta konseptið er, at kundin altíð skal kenna seg væl at koma inn til Auto Service – hann fær eina góða tænastu og verður avgreiddur beinanvegin, sigur Árni Rasmussen.

## Virka sum ein eind

Tvær høvuðsinngongdir eru inn í bygningin, ein í ovaru hædd, sum er beinleiðis til kundamóttøkuna til bilverkstaðin, eykalutagoymsluna og skrivstovuna, og ein til bilasøluna, sum er í niðaru hædd.



*Framsýningarhøllin hjá Auto Service er ein tann største av sínum slagi í landinum – ljós og innbjóðandi við plássi fyri 18 – 20 bilum. Á myndini eru f.v. sølumenninir Páll Danielsen og Heðin Weihe. Umftamt teir báðr eru Otto Andreasen John P. Wilhelm eisini sølumenn hjá Auto Service
Mynd: Álvur Haraldsen*